# Móttøka

Í sambandi við at 30 ár eru liðin síðan vit byrjaðu virksemi okkara, verður skipað fyri móttøku
á Hoyvíksvegi 63
**fríggjadagin 04.05.01 millum kl. 15 og 17.**

*Vælkomin inn á gólvið hjá*

30

Ivan Johansen Bilar



Í sambandi við at vit hátíðarhalda 30 ára stovningardag er opið:

**Leygardagin 05/05/01 kl.10.00–15.00**

•••

Umfraamt føðingardagstilboð, útboðið av brúktum og nýggjum bilum, verður

**HOPPIBORG OG SODAVATN TIL BØRNINI**

30

Ivan Johansen Bilar


# Ingálvur av Reyni út við nýggjari bók



*Leygardagin verður ein nýggj bók at fáa til keyps. Tað eru vatnlitamálningar hjá mæta listamanni okkara Ingálvi av Reyni. Málningarnir eru nýggir og vórðu sýndir fram í sambandi við 80 ára føðingardagin hjá Ingálvi. Málningurin á myndini er tó ein stórur oljumálningur*

BÓKAÚTGÁVA
*Stefan í Skorini*

Leygardagin 5. mai verður nýggj bók givin út við vatnlitamálningum hjá Ingálvi av Reyni. Í sambandi við at bókin verður løgd fram, verður samkoma í Listaskálanum leygardagin fyri innbodnum.

Tá Ingálvur av Reyni gjørdist 80 ára gamal í desember í fjør, varð fyrireikað framsýning í Listaskálanum. Allir málningarnir í tí framsýningini vóru málaðir í sama ári, so teir vóru frískir og ljómandi sum ongantíð. Nýskapandi og hugtakandi vóru hesir ljósmiklu og poetisku vatnlitamálningarnir.

Erik Fey forleggjari fekk hugskotið at geva út eitt úrval av hesum vatnlitamálningum í bók, saman við yrkingum eftir Janus Djurhuus, ið hava verið kveikjandi fyri málaran.

500 bøkur verða signeraðar, og kostnaðurin fyri hesi eintøk verður 280 krónur. Kostnaðurin á ósigneraðum bókum verður 250 krónur.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá elskaði maður og pápi okkara

**Johan Lisberg**
**Vágur**

andaðist og fór til gravar. Tøkk til Erland Beder, prest, fyri troystarrík orð, og til kirkjutænararnar. Tøkk til sjúklingahotellið Tórshavn, Hotel Bakkan og øllum tykkum, ið á ymsan hátt hjálptu til. Eina serliga tøkk til alt starvsfólkið á Suðuroyar Sjúkrahúsi fyri tykkara hjálp og troyst. Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur, og til tykkum, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*

**Kirsten, Randi og Johnny**



# Sjómansheimið í Reykjavík 10 ár

**Í ár eru 10 ár liðin síðani tað Føroyska Sjómansheimið í Reykjavík læt upp alment. Hetta verður hátíðarhildið sunnudagin 6. mai, og tá eru øll vælkomin at vitja sjómansheimið í Reykjavík, Ørkina**

HÁTÍÐARHALD
*Stefan í Skorini*

Fyrsti sunnudagur í mai mánaði, sum er 6., er tann árligi kaffisøludagurin hjá sjómanskvinnuringinum í Reykjavík. Tá vitja vanliga nógvir føroyingar og føroyarvinir sjómansheimið í Reykjavík. Tá verður boðin drýlur við skerpikjøti og annar matur.

Sjómanskvinnuringurin er ein hollur stuðul hjá sjómansheiminum, og tær hava savnað nógvan pening og innbúgv til heimið. Seinast keyptu tær eitt klaver til samkomusalin.

Hvønn sunnudag er møti á Sjómansheiminum og dúgliga verður vitjað umborð á skipini, har føroyingar eru við. Serliga eru tað rækjuskipini undir Eysturgrønlandi sum koma inn í Íslandi. Um summarið koma eisini snellu, kalva og línubátarnir.

Føroyingar í arbeiðsørindum í Íslandi búgva eisini nógv á Sjómansheiminum, men eisini ferðafólk ymsastaðni úr heiminum gista har um summarið.

Sjómansheimið hevur frá byrjan av virkað sum ein føroysk sendistova í Íslandi. Øll, sum hava spurningar um Føroyar ella vilja hava samband við føroyingar, venda sær altíð fyrst til Ørkina. Íslendskar fyritøkur og onnur, sum vilja hava føroyingar at arbeiða hjá sær brúka nógv hesa ókeypis tænastuna.

Flestu føroyingar kenna trúboðaran Jóhan Olsen úr Rituvík. Hann hevur í mong ár virkað sum trúboðari í Íslandi. Hansara ágrýtni saman við trúføstum vinum hjá heiminum bæði í Føroyum og í Íslandi gjørdu tað møguligt at byggja heimið. Løgtingið lat nakað at stuðli, men heimið er rikið uttan stuðul úr Føroyum, síðani tað lat upp. Fiskimannafelagið hevur eisini altíð stuðlað heiminum væl.

Fyrstu fyristøðufólkini vóru Elin og Símin Hansen úr Skopun. Síðani vóru tað Rosa og Jákup Hendrik Hansen erisini úr Skopun, og núverandi leiðarin er Eirná Ásgeirsdóttir, sum er íslendsk. Tað eru tó altíð føroyingar, ið arbeiða á heiminum.



*Sjómansheimið í Reykjavík er nú vorðið 10 ár, og sunnudagin verður hátíðarhald í heiminum*

# Savna inn til Rumenia

INNSAVNING
*Stefan í Skorini*

Rumenia-hjálpin hjá samkomuni Immanuel er farin undir eitt nýtt tiltak fyri at savna pening inn til nýggjan bygning, sum skal nýtast í arbeiðnum at hjálpa illa støddum rumeniabúgvum.

Hjúnini Durita og David Jacobsen hava virkað sum trúboðarar í stórbýnum Timisoara í Rumenia seks tey seinastu árini. Har hava tey sett á stovn eina kristna samkomu og ein hjálparfelagsskap. Endamálið er at røkka fólkið í økinum bæði við neyðsynjarvørum og við andaligum boðskapi. Hjúnini hava fingið heiðursprógv frá borgarstjóranum fyri sítt vælgerð-ararbeiði. Hjálparfelagsskapurin hevur beinleiðis samband við heimini. Tey vitja heim og skriva niður, hvat teimum vantar, og tað verður síðani koyrt út til heimið.

Samkoman Immanuel hevur seinstu árini staðið fyri at savna inn klæði, skógvar, mat, húsarhaldsting, sum verður sent við bussum til Rumenia. Í 1998 fingu hjúnini 2,5 tons av hjálparvøru úr Føroyum, men í ár 2000 er nøgdin av hjálparvøru 11,5 tons. Tí hava tey tørv á einum nýggjum hølum, so tey kunnu móttaka og avgreiða ta hjálparvøru, ið kemur úr Føroyum.

Nú er samkoman farin undir at savna pening inn til nýggjan bygning. Um nóg mikið av peningi kemur inn, er ætlanin at føroyskir handverkarar sjálvbodnir gera arbeiði. Rumeniahjálpin hevur konto bæði í Føroya Banka og í Føroya Sparikassa.


BRAKANDI TILBOÐ HETTA VIKUSKIFTIÐ

Violettir leður look jakkar
2 ymisk snið
Nú bert 100,-

Cowboyjakkar
Stødd S-XL
Nú bert 199,-

Magaketur
Ymiskir litir
Nú bert 69,-

Buksur frá Fransa úr strekktoyi
Svartar, Camel og violettar
Nú bert 150,-

Hvítar skjúrtur
Stuttar/langar ermar
Nú bert 100,-

Seytjan

Tórshavn
tel. 311305
Fríggjadag 4/5 er opið til kl. 19.00
leygardag 5/5 opið til kl. 17.00

Klaksvík
tel. 456517
Fríggjadag 4/5 er "Open by Night"
leygardag 5/5 opið sum vanligt